# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Eliesar Arge til minnis

Í desember mánað 2007 andaðist Essa Arge, 82 ára gamal. Essa mundi vera mest kendur fyri sítt starv sum skurðlækni á Landssjúkrahúsinum, men hann var eisini ítróttarmaður, og høvdu badminton og golf hansara serliga áhuga.

Millum aðra ítrótt, ið Essa eisini fekst við, men sum kanska ikki so nógv vita um ella hava gloymt, telist eisini fimleikur. Hann gjørdi fimleik við mannfólkaliðinum hjá Fimleikafelagnum Ljósinum í sjeytiárunum, tá felagið enn var ungt. Essa var eisini virkin á tí fyrisitingarliga økinum í fimleikahøpi, tí hann var nevniliga fyrsti formaður í Fimleikafelagnum Ljósinum og var við til at stovna felagið í 1975. Hann var eisini fyrsti formaður í Føroya Fimleikasambandi, tá tað varð sett á stovn í 1980.

Essa var giftur við Lydiu, ið bæði var uppruni til Ljósið og drívmegi í felagnum í mong ár, so helst hevur tað verið ein háttur at stuðla konuni, at hann tók við álitinum at vera formaður. Hann var formaður í nøkur ár, og var hetta í eini tíð, tá fimleikaframsýningar drógu nógv fólk til sín, og feløg ferðaðust kring landið at sýna fram. Essa var eisini partur av hesum framsýningum, har hann m.a. "passaði musikkin", og tað eru fleiri av gomlu limum felagsins, ið minnast aftur á hesa tíðina sum stuttliga og minnisríka.

Og hóast tað eftirhondini eru nøkur ár, síðan Essa var formaður og beinleiðis vardi av felagnum, so mugu vit siga, at fáur var so trúgvur til framsýningarnar sum Essa, tí tað munnu vera fáar sýningar, ið eru farnar aftur við borðinum, har Essa og Lydia ikki hava verið at sæð millum áskoðararnar.

Við hesum fáu orðum vilja vit lýsa frið yvir minnið um Essa Arge

**Fimleikafelagið Ljósið**



*Lydia og Eliesar Arge*

## †

### Andlát og jarðarferðir

**Martina T. Kruse** á Eiði, vanliga nevnd Martina hjá Jens Arna, andaðist á Korndalsbýlinum mánadagin, 92 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Eiðis Kirkju fríggjadagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Martinu, kunnu lata Korndalsbýlinum eina gávu.

Kistan við **Hera Simonsen Østerø** fer úr Landssjúkrahúskapellinum týsdagin klokkan 17. Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 13 úr Havnar Kirkju. Tey, ið vilja minnast Hera kunnu lata eina peningagáva til Føroya Felag Móti Krabbameini. Konta í peningastovnunum.

**Jóhan Olsen** við Gøtugjógv andaðist á Landsjúkrahúsinum mánadagin, 77 ára gamal.

**Brynhild Irena Joensen,** ættað av Hvítanesi andaðist 26. januar, 46 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Magleby kirke á Møn leygardagin 2. februar.

## Konsert í Læraraskúlahøllini

Nýggi føroyski felagsskapurin »Hjálp jødunum heim« fær forkunnuga vitjan úr Ísrael. Tað er jødiska sangkvinnan Israela Assago, sum fer at syngja og greiða frá síni serligu søgu, hvussu hon kom úr Etiopia til Ísraels.

Sunnukvøldið 3. februar kl. 20.00 verður konsert í Læraraskúlahøllini á Frælsinum í Havn. Umframt Israelu Assago, so fara eisini Heini Lützen og Sigrið Rasmussen at syngja á konsertini. Saman við songkvinnuni úr Ísrael, koma eisini føroyavinirnir Jan Rosenberg og Jakob Snir, sum fara at greiða frá aktuellum viðurskiftum í Ísrael.

Almenni Ísraelski hjálparstovnurin „Keren Hayesod", sum merkir „Sameinda Ísraelska Áheitanin", hevur deildir kring allan heim og hevur til endamáls at hjálpa jødunum aftur til Ísraels, eins og at hjálpa teimum veiku í Ísrael. Grunnurin hevur verið við jødafólkinum tá ringast stóð til, og eisini tá alt var gleði og gaman. Tað byrjaði á Zionistaráðstevnuni í London 26. juli 1920, tá nýggj vón birtist fyri at jødarnir kundu fáa sítt egna land. Beinanvegin var greitt, at peningur mátti útvegast til at menna hetta nýggja heimland teirra, og at byrjast skuldi frá berum botni.



*Jødiska sangkvinnan Israela Assago*

Frá tí at staturin varð stovnaður í 1948, er hann, á undranarverdan hátt, komin heilskapaður ígjøgnum eitt ótal av álopum frá sínum fíggindasinnaðum grannum.

Í tøttum samstarvi í meira enn 50 ár hava stovnarnir „Jewish Agency" og „Keren Hayesod" stuðlað Ísraelska Statinum fíggjarliga. Jødarnir eru bjargaðir heim úr mongum londum har teir vóru ótryggir og í vanda. Sum avleiðing av falli jarntjaldisins flutti veldig nøgd av jødum heim til egna land sítt, sum seinastu øldina er broytt frá turrari oyðimørk til fruktagott og nýmótans land, har fólkaræði er sett í hásætið.

Síðan Ísraelski staturin varð stovnaður hava hesir hjálpargrunnar, flutt nærum 3 mió. innflytarar til Ísraels og hjálpt teimum til rættis í landinum, stovnað fleiri enn 800 smærri bygdir í Ísrael, broytt 90 vánalig grannaløg til nútíðar býir, fyrireikað umsorgan og útbúgving fyri 300 tús. Ungdómar og hjálpt túsundtals ungdómum kring allan heim, at fyrireika seg til at flyta til Ísraels

Nógv er gjørt, men enn er langt á mál. Enn hava túsundtals jødar vánaligar umstøður og eru í beinleiðis vanda í londum har ófriður er, sum t.d. í Etiopia og í fyrrv. Sovjet. Eisini eru tað enn túsundtals ungir jødar sum ikki kenna sín samleika og sína søgu, og sum búgva í fjarskotnum avkrókum í umstøðum sum liggja langt undir tí sum vit taka sum sjálvfylgja.

Júst nú verður atbeitt við at fáa 17.000 jødar heim úr Etiopia. Teir liva undir sera truplum og vandamiklum umstøðum, og Ísraelska stjórnin hevur samtykt at hjálpa teimum heim til Ísraels. Verkætlanin er sera kostnaðarmikil fyri Ísraelska samfelagið. Arbeiðið byrjar í fyribilslegum, har Etioparanir fáa frágreiðing um Ísrael. Tá tey so eru komin til nýggja heimland sítt, byrjar ein innflytaraskrá, har tey læra hebraiskt mál, enskt, rokning, kunningartøkni og Ísraelska mentan, so tey vera væl fyrireikað til at fóta sær í nýggju tilveru síni heima í Ísrael.

Tey trý føroysku feløgini, Vinir Ísraels í Føroyum, Ísraelsfelagið og Ísraelsmissiónin, hava stovnað eina føroyska deild, nevnd Hjálp jødunum heim«.

Í tøttum samstarvi við „Keren Hayesod" hava føroyingar nú høvi at stuðla jødunum at flyta til Ísraels og at hjálpa teimum við fyribils bústaði, skúlagongd o.ø., soleiðis at teir verða førir fyri at standa á egnum beinum í nýggja heimlandi sínum.

Vinir Ísraels í Føroyum, Ísraelsfelagið og Ísraelsmissiónin vóna at Læraraskúlahøllin verður stúgvandi full, tí hetta verður eitt serstakt og forkunnugt kvøld, har Ísrael og útvalda fólk Guds, jødarnir, verða í middeplinum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri maður, pápi, verfaðir, abbi, langabbi og bróðir

**Jóhan Olsen**
Gøtugjógv

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 28. januar 77 ára gamal.
Kistan fer úr kapellinum hósdagin 31. januar kl. 17.00
Jarðarferðin verður úr Gøtu kirkju fríggjadagin 1. februar kl. 14.00

*Vegna familjuna*
**Marna**

Tey, ið vilja minnast Jóhan, kunnu lata Gøtu kirkju eina gávu.
Konta í peningastovnunum

†

Okkara góða mamma, vermamma, omma og langomma

**Martina T. Kruse**
Eiði

andaðist mánadagin 28. januar 2008
á Korndalsbýlinum, 92 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Eiðis Kirkju fríggjadagin 1. februar 2008, kl 14.00.
Sungið verður úr sálmabókini.

*Vegna tey avvarandi*
**Hanna, Tia og Olaf við familjum**

Tey, ið vilja minnast Martinu, kunnu lata Korndalsbýlinum eina gávu.

### Dagurin

**31. januar. Vigilius,** deyður ár 405. Kemur ungur til Trient, har hann í 385 gerst biskupur. Tá ið hann á eini trúboðaraferð kollveltir eina skurðgudamynd, verður hann steinaður til deyða.